## Barroso situr tryggur

Alt bendir á, at portugisin José Manuel Barroso heldur fram sum formaður í ES-nevndini eitt skeið afturat. Barroso er konservativur politikari, og tað góða úrslitið hjá tí borgarliga partinum av ES-tinginum sunnudagin tykist tryggja honum formansstarvið tey næstu fimm árini. Tað eru stjórnarleiðararnir í teimnum 27 limalondunum, sum tilnevna formannin, men ES-tingið skal góðkenna tilnevningina, og tað er neyvan nakar trupulleiki hjá Barroso, skrivar Ritzau. Sosialistarnir høvdu ætlanir um at fáa ES-nevndini ein annan formann, men tann sosialistiski tingbólkurin viknaði nógv sunnudagin, og tað styrkir eisini støðuna hjá Barroso.



## Brown slapp á hesum sinni

Í Bretlandi tykist Gordon Brown, forsætisráðharri og floksformaður, vera sloppin ígjøgnum tað politiska illveðrið, sum hann hevur verið í ta seinastu tíðina, og sum kom í hæddina sunnudagin, tá Labour fekk ein rættiligan frammaná á valinum til Evropatingið. Seinnapartin í gjár var Brown á fundi við tingbólkin hjá Labour, og aftan á fundin staðfesti tingbólkurin, at hann styðjar floksformannin. Sjálvur segði Brown seg hava lært, at ein lærir, so leingi ein livir. Ikki færri enn 11 ráðharrar og vararáðharrar eru farnir úr stjórnini, og á Evropa-valinum sunnudagin fekk Labour sítt ringasta úrslit í søgu floksins.

# Kappast í dygd ikki prísi

**H-DYGD hevur havt úr at gera síðani feðgarnir Jónberg og Johan á Mýruni saman við Poul Poulsen yvirtóku fyritøkuna fyri smáum tveimum árum síðani. Starvsfólkatalið er vaksið, maskinparkin útskift, og einki merkist til nakra kreppu hjá 40 ára gomlu fyritøkuni**




*Feðgarnir Johan og Jónberg á Mýruni, sum saman við Poul Poulsen yvirtóku H-DYGD í september 2007*

VINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

H-DYGD er gamla Vatnsoyrar Snikkaravirki. Tað eru nú feðgarnir Jónberg og Johan á Mýruni, sum saman við versoni Jónberg, Poul Poulsen, eiga virkið, ið teir yvirtóku 20. september 2007.

Virkið byrjaði fyri smáum 40 árum síðani, og tað var Hans Elmar Poulsen, sum setti tað á stovn.

– Pápi mín var við frá byrjan og starvaðist sum leiðari fyrstu tíðina, so hann hevur verið við fyrr. Eg og Poul vóru púra nýggir, tá vit yvirtóku virkið í 2007, sigur Johan á Mýruni, sum er sølustjóri í fyritøkuni.

Men hóast tað, so tóku teir ikki langa tíð at hugsa seg um, tá tað stóð teimum í boði at yvirtaka H-DYGD.

– Vit kendu jú fyritøkuna. Talan er um eina gamla og roynda og ikki minst væl rikna fyritøku, so tað tók okkum ikki langa tíð at taka av, tá hon stóð okkum í boði, sigur Johan á Mýruni.

Vatnsoyrar Snikkaravirki og seinni H-DYGD hevur øll árini fingist við at framleiða dygdar vindeygu serliga ætlað til tann føroyska marknaðin við tí serliga harðbalna føroyska veðurlagnum.

– Vit gera vindeygu úr timbri, úr træ-alu og úr plasti. Og so gera vit nakað av úthurðum eisini, sigur Johan á Mýruni.

Felagið hevur tvey virkir, eitt á Vatnsoyrum og eitt í Miðvági.

– Her á Vatnsoyrum gera vit timburvindeyguni, meðan plastframleiðslan fer fram í Miðvági. Umsitingin heldur so eisini til á Vatnsoyrum, sigur Johan á Mýruni.

### Effektiviserað

Virkini bæði hava nóg mikið at gera.

– Ja, vit hava úr at gera. Vit framleiða einar 7000-8000 eindir um árið, og tað er fyrst og fremst til føroyska marknaðin. Vit eru 30 fólk í starvi, og tað er nóg mikið at gera fyri hvørja hond, sigur Johan á Mýruni.

Men tað er ein serlig avbjóðing at framleiða hurðar og vindeygu til tað føroyska veðurlagið, sum er munandi harðbalari enn veðrið í londunum rundan um okkum.

– Ja, tað er tað, sum fyritøkan er kend fyri. At menna vindeygu og hurðar til serliga føroyska veðurlagið er ein avbjóðing, og okkara framleiðslur hava eina trygd upp á tíggju ár. Og livitíðin skuldi gjarna verið 30 ár, so tað skal nakað serligt til. Og tað er jú ein stór íløga, tá farið verður undir at skifta vindeygu, sigur Johan á Mýruni.

Eftir at feðgarnir saman við Poul Poulsen hava yvirtikið H-DYGD, hava teir eisini moderniserað »maskinparkina«.

– Ja, tað hava vit gjørt her á Vatnsoyrum í timburframleiðsluni. Her hava vit skift alla maskinparkina út og fingið eitt spildurnýtt flow í, og effektiviserað arbeiðsgongdina munandi, so tað er næstan talan um eina heilt nýggja fyritøku, sigur Johan á Mýruni.

Serliga tann eina maskinan er ógvuliga framkomin, og hevur loyst av sjey aðrar maskinur, sum virkið hevði framman undan.

– Ja, hon er rættiliga framkomin, er tað nýggjasta nýggja á marknaðinum og hon klárar so at siga alt, sigur Johan á Mýruni.

Hetta merkir kortini ikki, at virkið hevur minkað um starvsfólkatalið.

– Og tað er heldur ikki málið í sjálvum sær. Vit hava havt so mikið nógv at gera, at tað upp á sín vís er gingið út yvir leveringstíðina. Men nú eru vit nógv fleksiblari og effektivari, og klára at koyra meiri ígjøgnum upp á somu tíð. So málið er at framleiða okkum burtur úr tí, sigur Johan á Mýruni.

### Øktur kapasitetur

Sum hjá so mongum øðrum fyritøkum er eisini galdandi hjá H-DYGD, at eingin ordri er ov stórur og eingin er ov lítil.

– Vit hava latið til bæði skúlar og høsnahús, til privatkundar og til timburmeistarar og timburhandlar, so tað umfatar alt, og vit levera eisini kring alt landið, sigur Johan á Mýruni.

Framleiðslan hjá fyritøkuni er fyrst og fremst til føroyska marknaðin, og útflutningur er bert ein víðfáningur.

– Vit hava ikki reiðiliga havt fortreytirnar fyri at flyta út. Kapasiteturin hevur ikki verið nóg stórur. Føroyski marknaðurin liggur sjálvandi fremst, tað er har, vit hava spesialiserað okk-